Kvøldið er svartur kuldi.
Súni fer til gongu, hann hyggur út á havið, hugsar um strondina, at hann átti at farið oman har, átti at skrivað tey orð, sum skula til, skrivað tey í sandin og latið havið sogið tey í seg og skolað tey inn á hvørja einastu strond í øllum heiminum.

ISBN 978-99918-1-769-9
9 789991 817699

FØROYA LÆRARAFELAG
BÓKADEILDIN
www.bfl.fo

MARJUN SYDERBØ KJELNÆS
skriva í sandin
BFL

MARJUN SYDERBØ KJELNÆS

skriva í sandin

faðir!" Hann liggur longu á knæ, og hvør annar kann hjálpa honum nú? Hann biður, so tað svíður í hjartanum, tekur seg í at biðja um at fáa hana, sum hann hevur gjørt áður, tekur orðini aftur, nei, nú má Gud ráða, um alt er forkomið.

„Lat tað góða vinna á tí ónda," eru seinastu orðini, áðrenn hann letur eyguni uppaftur. Hann kennir ein lætta. Jann rennur honum til hugs, hann má fara at ringja til Jann.

Skriva í sandin

Súni hyggur at honum. Tvær gentur eru komnar inn, kunnu ikki vera meira enn 13-14 ára gamlar. Tær standa við bommhillina, tætt við kassan. Tær eygleiða hann, teska saman og fnisa. Súni sær, hvussu hann nýtur tað.

'Tak teg saman Tróndur!' hugsar hann.

Tróndur ger seg upp, smílist og filmar til teirra, meðan Súni má trýsta tvær slíputar pylsur niður í tvey fronsk hotdog-breyð til eina konu, ið stendur ótolin og bíðar.

„Vit mangla pylsubreyð!" Súni sær, at Tróndur ikki letur við seg koma. Hann sær eisini út til at hava mist áhugan fyri gentunum, stendur og fonglast við I-poddin hjá sær. Gud forbjóði, at hann ger nakað til nyttu!

„Pumpa nr. 3!" sigur ein maður og blakar ein pengaseðil á diskin.

„Vit mangla pylsubreyð!" Súni gevst ikki so.

„Karma police arrest this man," syngur Tróndur og hyggur spyrjandi upp á Súna. „Og?"

„Far eftir einum kassa í goymsluni!"

Tróndur fer dovisliga. Hann leggur leiðina framvið bommhillini, syngur fyri gentunum og fær tær at fnisa enn meira.

„Eg gav tær 500!"

Súni hyggur upp á mannin frammanfyri sær.

„Tú hevur givið mær 100 aftur, tað skal vera 400!"

„400?“

„Ja, eg koyrdi í fyri 100 og gav tær 500!“

Maðurin er í skipstroyggju og úlpu og einum keppi við oyraklaffum. Hann manglar tvær tenn í undirmunninum, og hvørja ferð hann tosar, kemur tungan út í gloppið. Súni snerkir við.

„Gev mær pengarnar!“ skrálar hann knappliga og leggur seg fram á diskin og roynir at fáa aðra hondina niður í kassatólið.

„Slappa av!“ sigur Súni og rættir honum tríggjar 100 krónuseðlar aftrat.

„Hvat er tað eisini fyri ein kraftidiotur, sum koyrir fyri 100 krónur í tangan?!“ Tróndur gongur undan Súna niðan brekkuna, nú er meiri ferð komin á hann.

„Bangin?“ spyr hann argandi og vendir sær hálvavegna, tá ið hann prátar afturum seg.

Súni sær inn á vangan á honum. Hann svarar ikki, er turrur í munninum. Kenslan er har aftur, kenslan, ið hann ikki veit, hvat hann skal gera við. Hann kennir seg eins fjákutan og genturnar handan bommhillina.

'Tosa, tosa nú við hann!' Og so onkursvegna megnar hann at sløkkja sína innaru pubertetsgentu. Hann økir ferðina og gongur aftur undir liðini á vinmanninum. Teir tosa, sum teir plaga, um hvar teir skula fara í býin í kvøld.

Súna rennur til hugs, hvussu hann í summar ivaðist, um hann skuldi fara í studentaskúla, men nú er hann væl nøgdur um avgerðina. Hann hevur fingið nógv nýggj vinfólk, ikki minst Trónd, sum eisini hevur skaffað honum kjansin á Effostøðini.

Teir eru á veg niðan til Súna og tey. Foreldrini hjá Tróndi hava bygt sær eina borg langt uppi í Hoyvíkshaganum. „Kann eg ikki bara sova her hjá tær?“ spurdi Tróndur tað fyrsta vikuskiftið, teir høvdu verið í býnum, og síðan hevði tað bara verið soleiðis.

Klokkan er farin av midnátt, tá ið teir standa inni á vesínum

og gera seg klárar. Tróndur fær sær oyraringar í, og Súni smyr voks í hárið. Súni hyggur at Tróndi í speglinum. Hann ger sær ómak, kannar andlitið á sær úr øllum vinklum.

Mamman stendur í hurðini. „Nú, eru pyntidukkurnar ikki lidnar her inni enn?“

„Hvat heldur tú?“ Tróndur snarar runt á gólvinum frammanfyri henni.

„Wauw. Brad Pitt!“ sigur mamman, „ og Johnny Depp!“ leggur hon aftrat og gevur Súna eitt lítið klemm.

„Ha, ha, gamlar rukkur!“ heldur Tróndur.

„Nú, nú!“ Mamman verður ikki liðug at fjasa uppi í teimum.

Súni hevur ikki hug at tosa við hana. Pápin hevur verið burtur í meira enn eina viku nú, og hon hevur aftur roynt at umborið seg við tí vanliga, at tey eru eitt sindur on and off. Súni veit ikki, hvat honum dámar betur, on ella off; *on* merkir eftir øllum at døma, at tey ganga og høgga eftir hvør øðrum undir sama taki og *off*, at pápin pillar av. Sama hvussu torført tað kann vera at tosa við pápan, so saknar Súni hann altíð, tá ið einir tveir dagar eru farnir.

Tá ið teir koma inn á Hvonn, rópar ein maður á teir frá einum borði.

„Og fanin, tit síggja út!“ sigur hann, tá ið teir nærkast.

Súni hevur upplivað reaktiónina so oftani fyrr, at hann geispar við tankan um, hvussu trivielt hetta prátið fer at verða. Maðurin hevur hug at bjóða teimum eina øl. Súni setist, ikki tí hann hevur hug, men tí at Tróndur presenterar viðkomandi sum pápabeiggja sín.

„Hugnaligt!“ sigur Súni og rættir honum hondina

„Harra Gud, tit lukta sum ein heil parfumufabrikk!“ letur í tí smáfeita, bleika manninum.

Hann reisist og fer yvir til barrina. Súni fær ikki tíð at fáa Trónd við uppá at flyta til eitt annað borð, fyrr enn pápabeiggin kemur aftur við ølinum.

„Takk!" sigur Súni og fær sær ein lítlan smakk. Í veruleikanum dámar honum einki serligt øl, heldur í heila tikið, at føroyingar drekka ov nógv. Fólk duga sær ikki hógv, men eru primitiv og ósiviliserað, tá ið tey fara í býin. Hann setist við krossløgdum ørmum og hyggur runt í hølinum. Her sita tey spjødd runt við borðini og royna at tosa harðari enn tónleikurin, ið buldrar út úr hátalarunum.

„Kom nú!" sigur pápabeiggin og tekur um herðarnar á teimum, „sig tað bara, eru tit av hinum slagnum ella hvussu?"

Súni hevur bara sitið og bíðað eftir spurninginum. Hann plagar bara at lata Trónd svara sítt: „Nei, for helviti!" Men í kvøld følir hann seg eitt sindur besettan og leggur aðra hondina á lærið á pápabeiggjanum og hyggur beint inn í eyguni á honum.

„For sátan!" sigur pápabeiggin og reisist so knappliga, at borðið er um at koppa.

„Hvat hendir?" spyr Tróndur, sum ikki hevur fingið nakað við og hyggur undrandi at pápabeiggjanum, ið stýrir beint inn á vesið.

Súni yppir øksl. 'So varð friður av honum,' hugsar hann og fær sær ein størri smakk av ølini. Hann fær hug at leypa út í tað primitiva og ósiviliseraða, um ikki annað so fyri at gloyma.

Súni er fyrstur at vakna morgunin eftir. Tróndur liggur á eini madrassu á gólvinum. Tá ið Súni letur eyguni upp, sær hann beint niður í andlitið á honum. 'Tróndur, seinasta hálva árið hevur alt verið Tróndur.' Súni smílist at sær sjálvum, hann hevur glett seg at fara í skúla um morgnarnar, glett seg til vikuskiftini, enntá glett seg til tey kvøldini, teir hava arbeitt somu vakt á Effostøðini.

Løgið nokk er tankin ikki so ræðandi, hóast hann óivað átti at skúgvað hann so langt burtur frá sær sum gjørligt, í hvussu so er um hann ætlar sær at hava bara eitt nøkulunda lættlivað lív á hesum klettunum av einum landi.

Hann letur tankan spæla sær inni í bringuni, meðan hann hyggur at varrunum, hann kundi hugsað sær at kyst. Tróndur letur eyguni upp. Eitt bil tykist hann sveima millum dreym og tilvitsku.

„Góðan morgun," sigur hann so svøvntungur á málinum.

„Morgun," sigur Súni og vendir sær á bakið, gníggjar sær í andlitinum við báðum hondum og renir tær upp í hárið.

Tróndur geispar hjartaliga.

„Eg veit, hvat tú hugsar!" sigur hann.

„Hvat?" Súni stívnar.

„Nú er tað fanin meg uppá tíðina!"

„Til hvat?" spyr Súni og vendir sær hond upp undir kinn at hyggja at Tróndi, ið strekkir seg út.

„At vit fingu okkum eitt sindur av FISU!" Hann skrálar tað seinasta orðið og rættir annan armin upp við einum knýttum neva, meðan hann flennir upp á Súna.

Súni letur seg detta niður á bakið aftur. 'Hvat annað hevði hann væntað? *Sjarmera og penetrera* sýnist at vera slagorðið hjá Tróndi.' Súni ristir uppgevandi við høvdinum, 'og hvat er hansara egna slagorð? *Lata vera og masturbera?* Yrkjari er hann, Gud hjálpi mær eisini blivin. 'Súni, tann poetiski gjeikarin!'

„Kom nú!" Tróndur roynir at hála dýnuna av honum, tá ið hann onki svarar.

„Ókey, ókey, tú hevur rætt!" sigur hann og neyðheldur í dýnuna.

Fartelefonin hjá Súna ringir, og hann hoyrir strongdu røddina í pápanum.

„Gongst?"

„Fínt!" svarar Súni, ið framvegis fylgir við uppkláringini á skíggjanum.

„Og mamma?"

Súni svarar ikki, hevur hug at biðja hann for helviti ringja til hana sjálvur, um hann vil vita, hvussu hon hevur tað!

„Nei, ætlaði bara at lodda dýpið ..." roynir pápin í hinum endanum.

Súni kveitir aftur um seg, mamman, sum júst er komin frá arbeiði, situr við beinunum uppi undir sær, einum reyðvínsglasi í aðrari hondini og eini bók eftir Obama í hinari.

„Tú kanst jú altíð vóna!" sigur Súni í einum speiskum tónalagi, tá ið hann hevur lisið heitið: „The Audacity of Hope." Mamman hyggur upp og skálar við reyðvínsglasinum.

Nú er tað pápin, ið tigur.

„Hon lesur Obama ..." suffar Súni.

„Á ..." grælar tað heldur uppgevandi í pápanum.

Súni roynir at fanga tráðin í CSI aftur, men fær ikki savnað seg um at lesa undirtekstirnar. Hann hoyrir heldur ikki, hvat tey siga, tí pápin er farin at tosa um, at hann helst kemur framvið í morgin eftir onkrum, sum hann manglar, og biður hann heilsa mammuni tað.

„Ja, ja, ja!" sigur Súni, brýtur av og blakar argur telefonina frá sær.

„Hvat segði hann?" kemur tað drálandi frá lenistólinum aftanfyri.

„Ring og spyr!" Súni kókar, og Tróndur hyggur upp á hann við einum skeivum smíli.

Eina løtu seinni hoyrir Súni, at Obama verður hirdur á borðið, og at mamman reisist og fer inn í køkin.

„Tað mígur niður!" Súni hevur hug at setast aftur. Hann stendur

við køksvindeygað og sær, hvussu ælini koma syftandi inn eftir Nólsoyarfirði.

„Ja, elskuligi pápi tín er jú rýmdur við bilinum, so her er eingin hjálp at heinta!"

Mamman liggur á knæ og vaskar innast í einum hornaskápi, sum hon hevur tømt út á gólv. Og tað er ikki tað einasta, hon hevur tømt; Súni lyftir reyðvínsfløskuna uppfrá.

„Forbannað moðið veður!" roynir hann í einum eg-tími-ikki-tónalagi, tá ið Tróndur kemur inn í køkin.

„Tvætl, vit taka ein bil, ikki fjasa!" Tá ið Tróndur vil í býin, er einki, sum kann steðga honum.

Sjálvsagt vil øll Havnin hava ein bil, so seinni leggja teir á dyr, tí Tróndur ikki hevur tol at bíða 20 fucking minuttir. Teir hava ikki gingið meira enn 20-30 metrar, tá ið teir mugu inn undir eitt bilportur at kroka.

„Kom til hús, eg tími ikki hetta her!" Súni hoyrir væl, hvussu grenjutur hann ljóðar. Tróndur sær út til at ætla sær at muta ímóti, men júst tá fer ein hurð upp, og ein genta kemur út við einum posa í hondini. Hon hevur ógvuliga sítt, svart hár og er í einum strammum, reyðum kjóla, sum er so stuttur, at reyvarbøllarnir koma undan, tá ið hon bukkar seg niður at leggja ein posa í ruskílatið.

„Halló!" sigur Tróndur og sleikir sær um varrarnar.

Gentan verður so kløkk, at hon gevur eitt hvin frá sær. Hon vendir sær á og stendur eina løtu við aðrari hondini omanfyri eyguni og blunkar; so ber hon eyga við teir í myrkrinum.

„Íjøss, er tað tú, Súni?!"

Súni stendur púra býttur, men kennir so grannagentuna aftur.

„Hey ... Ásla!" Hon hevur sanniliga staðið í vøkstri seinastu árini, leggur hann til merkis og kveitir eftir bróstunum á henni,

ið ikki hava nógv pláss í reyða kjólanum. Tróndur er so hugtikin av teimum, at Súni má koyra undir hann.

„Tróndur!" sigur hann og rættir hondina fram. Hann sleppir ikki aftur beinanvegin, og Súni blundar uppgevandi.

„Hey!" sigur Ásla og stendur so bara og hyggur upp á Trónd.

„Ásla?" Ein reyðhærd genta kemur út í hurðina, og nú hoyrist tónleikur innan úr húsinum.

„Ná, her er veitsla í kvøld?" spyr Tróndur, sleppir takinum á Áslu og hyggur áhugaður at gentuni í hurðini.

Súni veit, hvat nú fer at henda, tað er eins víst og amen í kirkjuni:

„Ijøss, eg eri óblíð, koma tit ikki inn?" spyr Ásla ovurhugað.

Súni roynir at hyggja ávarandi at Tróndi, men har er sjálvandi eingin kjansur at fáa eygnasamband. Ásla hálar kjólan tað evarska lítla pettið, tað ber til at hála hann niður um reyvarbøllarnar aftur, tá ið teir fara aftaná henni inn í húsið.

Leygarkvøld er, og hann stendur í eini temaveitslu fyri tannáringar. Stovan, hann og Tróndur eru lendir í, er pyntað við bendlum og amerikanskum fløggum. Genturnar eru allar í reyðum, og teir fáu dreingirnir, sum eru her, eru í hvítum skjúrtum og bláum kovboybuksum. Eini 10 fólk sita og hanga í stovuni, meðan nakrar gentur dansa eitt ella annað slag av kiksaðum squaredance.

„Hey øll!" rópar Ásla, „hetta eru Súni og Tróndur!"

Onkur sigur halló, meðan tey flestu ikki fáa við, hvat tað er, hon tosar um.

„Tað er bara at fáa sær!" sigur hon og peikar yvir á eitt borð við kips- og bommskálum og einum ovurstórum glasbolla við onkrum flótandi bláum í.

„Hatta er sovorðið punsj, tú veit, High School tema," roynir hon at forklára.

„Eigur tú ikki eina øl?" spyr Tróndur.

„Á jú," sigur hon, og Tróndur fer aftaná henni inn í køkin.

Reyðhærda gentan, sum var komin út í tún eftir Áslu, rættir hondina móti Súna.

„Rebekka," sigur hon

Súni tekur í hondina og roynir at kroysta eitt smíl fram.

Tá ið Tróndur kemur aftur við eini øl í aðrari hondini og hinari um lendarnar á Áslu, hevur Súni fingið eitt pláss í sofuni og eitt glas av eiturlittu vætuni.

Duffy er farin at í holt við Mercy, og Tróndur og Ásla amast uppi í hvør øðrum á gólvinum – dansur, skal tað helst eitast fyri at vera.

Súni tømir glasið, hann situr við, tað smakkar av akvaviti. Hví fanin fer hann ikki bara til hús? Tann reyðhærda, sum eftir øllum at døma sær tað sum sína uppgávu at taka sær av honum, fyllir honum upp í aftur glasið. Hann hyggur upp á hana, heldur, at tað er okkurt órannsakandi syrgið við henni; fær ikki avgjørt, um tað kanska er, at hon roynir at vera okkurt, hon ikki er, ella tí hon roynir at fjala út yvir tað, hon veruliga er. Hann hevur eyga fyri tílíkum, kennir alt til tað innilæsta.

„Skál!" heilsar hann henni og tømir enn eitt glas.

Tróndur hevur lagt hendurnar niður á illa fjaldu reyvarbøllarnar, og Súni eygleiðir, hvussu fingrarnir ferðast í bylgjandi rørslum upp og niður, upp og niður. Glasið verður fylt aftur. Tey fríggja, eru steðgað upp millum hini, sum aftur eru farin at dansa squaredance. Hann teskar henni okkurt í oyrað, og tey flyta seg móti hurðini. Í tí tey fara út, vendir Tróndur sær á, smílist til Súna og rættir hondina upp við einum knýttum neva aftanfyri bakið á henni.

„Skál fyri tí," mutlar Súni.

Hvussu hann er komin út á vesið, er hann ikki rættiliga greiður

yvir, men hann følir eina hond halda um ennið á sær, tá ið hann goysir alt tað bláa burtur úr sær aftur.

„So, nú fert tú at fáa tað betur," sigur ljósa røddin, ið óivað hoyrir til hondina.

„Takk," sigur hann og roynir at koma á føtur. Hann fær eyga á hana í speglinum, nær at síggja, at hon hyggur við samkenslu at honum, áðrenn hann aftur ofrar, hesaferð í vaskið.

Vamlið fylgir honum allan vegin heim, hann fer bara, flýggjar. Ongantíð hevur teinurin úr øðrum endanum á gøtuni í hin verið so drúgvur. Hann má aftur og aftur steðga á, rena fingrarnar í hálsin og vóna. Men klíggjanin situr føst í innvølunum og trýstir upp í barkan.

Hann liggur á knæ millum nakrar runnar, flennir, hóast hann hevur bestan hug at gráta og grulva allan vegin heim. Ella kanska kann hann bara leggja seg her, ja leggja seg og ongantíð reisa seg aftur. Tað regnar enn, glopraregn, grimdarregn, lortaregn! Hann er á kroppi. Tvær hendur eru har at hjálpa honum, júst sum hann ætlaði sær niður á albogarnar. Í einum taki verður hann hálaður á føtur.

'Sterk genta,' hugsar Súni og væntar at síggja hina reyðhærdu enn einaferð. Í staðin sær hann inn í andlitið á Tróndi.

„Kom nú, kom!" Hann tekur annan armin upp um herðarnar og fer dragsandi avstað við honum.

„Tróndur, tú ert ein deiligur drongur!" Súni leggur høvdið inn ímóti honum.

„Ja, ja, gang nú bara!" sigur Tróndur.

„Tróndur, tað er nakað, eg má fortelja tær!" Súni hevur hug at fáa tað sagt, tað er nú ella ongantíð.

„Halt kjaft Súni, tú vakir mammu tína!"

Teir eru komnir inn í gongina og fara stýrandi inn í kamarið.

Tróndur hálar tann váta jakkan av Súna og sleppir honum niður á songina.

„Tróndur, eg eri so forbannað góður við teg!" sigur Súni og tekur um armarnar á honum.

„Tað er fínt!" sigur Tróndur. „Legg teg nú og sov." Hann hálar skógvar, hosur og buksur av honum og leggur dýnuna oman á hann.

„Men Tróndur eg ..." Tróndur lurtar ikki, hann er á veg útaftur. Súni eygleiðir hann. 'Tróndur, alt er Tróndur.'

Tað melur fyri honum, og hann má leggja høvdið niður á koddan.

Tá ið Súni vaknar, er hann einsamallur í kamarinum. Tey eru harðmælt í køkinum, ein vavstur av tveimum røddum, ið ikki duga at finna somu takt. Hann kennir tað sum eina óendaliga svarran, baktónleikurin til allan hansara uppvøkstur.

Hann hálar dýnuna upp um oyruni og hyggur niður á bólið á gólvinum. 'Hvar man hann vera?' Hann fær tó ikki savnað seg um at hugsa um hetta leingi; klíggjanin er á honum, noyðir hann úr songini og inn á vesið. Í nakrar tímar hevur einki nakað at týða, hann heldur, at tað man vera soleiðis, tað kennist at vera deyðasjúkur, bara hugsa um at hóra undan, yvirliva.

Mamman tosar um at ringja eftir læknanum, og pápin kemur við øllum sínum heimaráðum móti hundasjúku. Súni letur tey bara tosa. Tá ið hann hevur spýð so ofta, at hálsurin kennist etsaður, og tað bankar í høvdinum, byrjar at batna. Tað er nærum ein lukkulig kensla av at kunna drekka eitt glas av kola og halda tí niðri. Brádliga gerst hann svangur, og pápin loypur avstað eftir trimum hálvum høsnarungum og kips. Tey sita við køksborðið, foreldrini, ið smílast hvørt upp á annað, kroppurin, ið takksamur tekur ímóti tí salta matinum; kanska er lívið ikki so galið kortini.

„Súni!“ Hann rópar í gongini og stendur so har í køkshurðini. „Hey, tit bæði!“ sigur hann og heilsar uppá foreldrini hjá Súna.

„Hvar hevur tú verið?“ Súni veit ikki, um hann í veruleikanum vil vita tað.

Tróndur flennir bara, fortelur, at hann hevur verið til ein familjudøgurða hjá ommu síni, og at hann nú hongur uppá eitt systkinabarn og vinmannin hjá honum, sum vil hava teir við á møti.

„Møti?“ sigur Súni og er um at seta eitt petti av høsnarunga í hálsin.

„Ja, kom við, eg dugi ikki at siga nei, tú veitst, tað er Jann, tað koyrir ikki so forbannað væl hjá honum.“

„Og tí skal eg við á møti?“ Súni hyggur vantrúgvin at honum; nær hevur møti nakrantíð verið hansara ting.

„Tak tað sum eitt antropologiskt upplivilsi!“ sigur Tróndur og tekur um herðarnar á honum. Súni angrar, at hann hevur fortalt Tróndi, at hann ætlar sær at lesa antropologi. Hann hyggur uppá foreldrini fyri møguliga at fáa eitt sindur av stuðli, men tey síggja Gud hjálpi mær út til at vera mest áhugað í hvør øðrum nú.

„Ókey meðni!“ sigur hann og fær sær tvey kips aftrat, „men eg má til hús beint aftaná at gera skúlating – stílar – lívfrøði, minnist tú!“

„Sjálvandi, sjálvandi!“ vissar Tróndur hann um.

Teir sita lið um lið á einum samkomulofti, og Tróndur syngur, syngur so hjartaliga, sum meinar hann hvørt einasta orð. Súni situr og hugsar, hvør hann í veruleikanum er, hesin, ið hann onkuntíð kennir tað, sum hann ikki kann liva fyriuttan. Hvør ert tú Tróndur?

Sangurin tagnar, og ein maður fer upp á talarastólin. Her av svalanum síggja teir niður í skallan á honum. Hann talar um eina kvinnu, ið skuldi verða steinað til deyðis, at Jesus skrivaði okkurt

í sandin og bjargaði lívinum á henni. Súni kennir søguna aftur: Tann, sum er syndafríur, hann kasti fyrsta steinin, og eingin kastar, eingin! Soleiðis kennir hann seg viðhvørt, sum ein, ið fer at verða steinaður, ikki bókstavliga, men kortini er ræðslan har. 'Hvat mundi Jesus skriva í sandin? Hvørji orð skulu til, fyri at menniskju ikki skula seta seg sum dómarar yvir øðrum?'

„Hon sær gott út handan har, ha?“ Tróndur hevur lagt armin um herðarnar á honum, røddin kennist heit móti oyranum.

Súni følir eina møði breiðast innan í sær. Gentan kemur við út í bilin, hon kennir onkursvegna sjaførin. Súni letur tey øll seta seg inn, hevur fest sær í eina sigarett. Hevur funnið ein hálvan pakka í jakkalummanum og hevur hug til ein guv, hóast hann er givin fyri tveimum mánaðum síðan. Hann sløkkir ikki út, men setir seg inn aftan, rullar rútin niður. Tróndur situr í miðjuni, og úti við hitt vindeygað situr gentan; hon er vøkur, døkk í holdinum, og Tróndur er longu farin í gongd, heldur eitt sindur ov leingi í hondini á henni, tá ið hann sigur, hvør hann er.

'Tróndur,' hugsar Súni, 'alt kann ikki longur vera Tróndur.' Hann koyrir við teimum, blundar og følir beinið á Tróndi móti sínum, armin móti armi hansara. Hann letur eyguni upp aftur og eygleiðir vangan á honum. So orkar hann ikki meira, hann vil út, rópar um, at bilurin skal steðga, steðga nú! Tey lata hann fara.

Kvøldið er svartur kuldi. Súni fer til gongu, hann hyggur út á havið, hugsar um strondina, at hann átti at farið oman har, átti at skrivað tey orð, sum skula til, skrivað tey í sandin og latið havið sogið tey í seg og skolað tey inn á hvørja einastu strond í øllum heiminum.